# Norðlýsið

Norðlýsið hevur í nógv ár siglt fastur túrar runt um Nólsoynna og út í Hest um summarið, um veðrið hevur verið gott. Hesar túrarnar ætla teir sær at halda fram við, sigur Birgir Enni.

- Ja, vit fara aftur í ár at hava fasta túrar út til Nólsoyar ella til Hest. Hesir túrar vera á morgni týsdag og hósdag. Harafturat fara vit eisini at hava nakrar konserttúrar, har tónleikabólkar spæla úti í hellunum í antin Nólsoy ella Hesti. Hesir túrarnir vóru sera væl dámdir í fjør, so tí fara vit at royna hetta aftur í ár.

Hóast fleiri føroyingar eru við á túrunum hjá Norðlýsinum, so er tað tó flest útlendingar, sum royna hesar túrarnar. Gestirnir fáa mat umborð á sluppini, um tey vilja, og harafturat hevur sluppin útgerð at fiska við, soleiðis at gestirnir eisini sleppa at royna hetta.

Í mun til í fjør, so hevur Norðlýsið keypt sær ein skjóttgangandi bát, sum er gjørdur í Írlandi. Báturin gongur skjótt og ber seg ógvuliga væl. Hann er ikki góðkendur av skipasýninum enn, men tað verður hann ætlandi heilt skjótt. Hesin skal m.a. brúkast til at fara inn í stór helli við, og so kann hann sigla fólk skjótt heim, um tey hava hug til tess. Báturin kann tó eisini brúkast til leigutúrar, tá hann verður góðkendur av skipasýninum.



*Norðlýsið hevur keypt ein nýggjan skjóttgangandi bát, sum verður knýttur at sluppini. Nýggi báturin kann tó eisini nýtast til leigutúrar, tá hann verður góðkendur av skipasýninum.*




















